# Framtíðin er í ríkisfelagsskapinum

**Sambandsflokkurin hevur sett ríkisfelagsskapin ovast á dagsskránna undan komandi løgtingsvali. Flokkurin sær ríkisfelagsskapin sum eina avgerðandi fortreyt fyri, at frælsi hjá tí einstaka og vælferðin verða varðveid. Samstundis ynskir flokkurin eisini at varðveita fólkatingsumboðini í framtíðini**

VALSKRÁ
*Heri á Rógvi*



*– Í tráð við, at flokkurin fyrst og fremst vil tryggja vælferðina og samstundis ásanna vit, at tað er stórur tørvur á betringum á fleiri økjum, so síggja vit onga orsøk til at minka ríkisveitingina júst nú. Eisini tá hugsað verður um, at fíggjarlógin fyri komandi ár nærkast einum undirskoti, virkar tað mestir sum um, at vælferðin verður sett til síðis fyri fullveldinum, sigur Lisbeth L. Petersen*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Í vikuni kunngjørdi Sambandsflokkurin, hvørja leið flokkurin ætlar at ganga í sambandi við komandi løgtingsval. Flokkurin hevur kunngjørt sína valskrá ella valupplegg. Arbeitt hevur verið við hesum í longri tíð nú. Valskráin er fyrst og fremst ætlað til løgtingsvalið, sum væntandi verður komandi vár. Tá ið tað nú stundar til fólkatingsval, so kunnu partar av valskránni eisini nýtast til hetta endamálið.

Sambandsflokkurin hevur sett ríkisfelagsskapin, persónliga frælsið hjá tí einstaka og tryggjanina av vælferðini ovast á breddan til komandi løgtingsval.

– Talan er ikki um nakra beinleiðis raðfesting, men tað er greitt, at vit eitt nú meta ríkisfelagsskapin vera eina fortreyt fyri vælferðina og frælsið hjá tí einstaka, sigur Lisbeth L. Petersen, formaður fyri Sambandsflokkin.

Sambandsflokkurin leggur stóran dent á, at framtíðin hjá Føroyum eigur at liggja innanfyri ríkisfelagsskapin. Flokkurin vísir eisini á nýskipanaruppskotið hjá sær, sum varð gjørt fyri nøkrum árum síðani. Tað uppskotið vísir heilt greitt, hvussu langt flokkurin er sinnaður at ganga innanfyri ríkisfelagsskapin.

– Ríkisfelagsskapurin er so nógv annað enn pengar, og vit ynskja als ikki at byggja samfelagið upp á ríkisveitingina, sigur Lisbeth L. Petersen.

Sambandsflokkurin ynskir ikki, at ríkisveitingin skal bera føroyska samfelagið, og ríkisveitingin skal heldur ikki vera ov stór og eigur at verða regulerað eftir tørvi.

-– Í tráð við, at flokkurin fyrst og fremst vil tryggja vælferðina og samstundis ásanna vit, at tað er stórur tørvur á betringum á fleiri økjum, so síggja vit onga orsøk til at minka ríkisveitingina júst nú. Eisini tá hugsað verður um, at fíggjarlógin fyri komandi ár nærkast einum undirskoti, virkar tað mestir sum um, at vælferðin verður sett til síðis fyri fullveldinum, sigur Lisbeth L. Petersen.

Eisini ynskir Sambandsflokkurin at varðveita umboðanina á fólkatingi. So at siga allir flokkar í Føroyum hava meldað út, at teir ynskja at avtaka føroysku umboðanina á danatingi við árunum, men hetta ynskir Sambandsflokkurin als ikki. Sambandsflokkurin sær umboðina á fólkatingi sum ein part av ríkisfelagsskapinum.

### Møguleikar

– Sambandsfólk kenna seg sjálvandi fræls, tá ið vit nú liva í einum frælsum landi og frælsum ríkisfelagsskapi, sigur Lisbeth L. Petersen.

Sambandsflokkurin hevur sett persónliga frælsið hjá tí einstaka ovarliga á dagsskránna.

Alfred Olsen, tingmaður fyri Sambandsflokkin, sigur, at í ríkisfelagsskapinum liggja so nógvir møguleikar, tá ið tað kemur til útbúgving, heilsuverk v.m.

– Sambandsflokkurin hevur altíð havt umsorgan fyri, at hvørt einstakt fólk skal hava frælsi starv, heilsuhjálp og annað. Við ríkisfelagsskapinum lata vit í veruleikanum eina hurð upp til fleiri og betri møguleikar, sigur Alfred Olsen.

Alfred Olsen ivast ikki í, at ríkisfelagsskapurin vil tryggja tað mesta persónliga frælsið.

– Í ríkisfelagsskapinum fáa vit atgongd til mestu møguleikarnar, og í ríkisfelagsskapinum faa vit samstundis atgongd til tað frælsið, sum ikki kostar nakað, sigur Alfred Olsen.

### Røktarpláss og pensjón

Sambandsflokkurin hevur eisini sett almanna- og heilsumál á válskránna. Flokkurin ætlar at fáa fleiri røktarpláss í Føroyum. Samstundis ynskir flokkurin eisini, at pensjónirnar í Føroyum skulu vera á sama støði sum í okkara grannalondum.

– Sambandsflokkurin vil við fólkapensjónini tryggja, at pensjónistar fáa eina pensjón, sum teir kunna liva av, sigur Lisbeth L. Petersen.

Hon sigur samstundis, at Sambandsflokkurin ikki útilokar, at fólk fáa sær privatar pensjónir, men fólkapensjónin eigur at vera til at kunna liva av.

Sambandsflokkurin vil út við nøkrum tølum um, hvat alt hetta fer at kosta. Lisbeth L. Petersen sigur, at fyriliggja onkrar útrokningar, men hesar eru ikki heilt lidnar enn.

Flokkurin heldur í øllum førum, at tað ikki er eitt stig tann rætta vegin at skerja ríkisveitingina.

Sambandsflokkrurin sær fegin, at eitt nýtt landsstýri kemur til eftir næsta val, har Sambandsflokkurin er umboðaður.

### Seinni í vikuni

Av skrivstovuni hjá Sambandsflokkinum verður upplýst, at listin yvir valevni til fólkatingsvalið væntandi verður greiður seinni í vikuni. Flokkurin fer væntandi eisini sum skjótast at almannakunngera listan.

Eftir hvat skilst, so verður listin rímiliga stórur, og umboð úr øllum landinum vera væntandi á listanum.



*Sambandsmenn ætlar sær á val við ríkisfelagsskapinum ovast á listanum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Misjavnar meiningar um navnalógina

**Undir fyrstu viðgerðini av navnalógini í tinginum komu eitt sindur misjavnar áskoðanir fram. Teir flestu politikararnir høvdu onkra navnasøgu at siga frá, og tíðin fór mest við hesum. Flestu tingmenn tykjast samdir um lógarleistin, um teir altso kunnu fáa okkurt navnið afturat við á listan**

TINGMÁL
*Heri á Rógvi*



*Eisini onkur málfrøðingur leitaði sær niðan í Útvarpshøllina henda dagin, tá ið navnalógin kom fyri tingið*

Tað var herfyri, at Høgni Hoydal, landsstýrismaður við lógarmálum, legði fram broytingaruppskot í føroysku navnalógini. Føroyska navnalógin er frá 1992, og hann ásetir einari navnanevndin at gera ein listan yvir tey nøvn, sum eru góðkend í Føroyum. Velur onkur at kalla seg annað navn enn eitt, ið stendur á listanum, so er hetta at meta sum lógarbrot og kann revsast. Men fyrst skalt tú fram við skrásetingarmyndugleikanum, t.e. prestur aloftast. Sigur prestur nei til eitt ávíst navn, so kann tann einstaki kæra til navnanevndina og í seinna føri landsstýrismannin.

Alt hetta verður framvegis óbroytt í framtíðini eftir ætlan. Tað skal gerast lættari at uppkalla og eisini ættleidd børn skulu fáa lættari við at taka upprunanavnið aftur. Tað verður eftir ætlan framvegis navnanevndin, sum kemur at siga hvat og hvussu. Eftir hvat skilst, hevur navnanevndin havt heldur truplar umstøður at virka undir, men nú skal arbeiðið hjá nevndini eftir øllum at døma ganga væl. Tey flestu broytingarnar í lógini snúgva seg mest um skráseting og umsiting.

Ein onnur nevnd hevur síðani fyrireikað eitt uppskot at endurskoða navnalógina. Hetta hevur síðani verið úti til viðmerkingar, og er síðani lagt fyri tingið. Meginreglan í navnalógini er framvegis tann sama: at øll nøvn skulu vera í samljóð við føroyskar málreglur. Nøvn, sum eru til í føroyskum máli skulu eisini hava røttu føroysku stavsetingina, eitt nú Christian verður til Kristian og Daniel til Dánjal.

### Søgur

Ein av teimum, sum oftast stilla seg á tingsins røðarapall, var Jógvan á Lakjuni úr Fólkaflokkurin. Hann legði eisini sera hart út og setti spurnartekin við, um alt hetta arbeiðið nú var neyðugt. Hann eins og aðrir fýltist rættiliga nógv á, at fólkið slett ikki verður eftirspurd í hesum spurninginum, og hann eins og aðrir vísti á, at fleiri fólk leitaðu sær til Danmarkar fyri at doypa síni børn. Samstundis sum hann segði hetta, kom hann eisini við tí hugskoti, at øll børn í einari familju skuldu eita sama eftirnavn. Navnanevndin fekk somuleiðis av grovfíluni frá fuglafirðinginum.

– Mann fær altíð svar frá navnanevndini, men tá tað so kemur, so kann tað ikki brúkast, sigur Jógvan á Lakjuni.

Eisini javnaðartingmenninir, Hans Pauli Strøm og Dan Reinert Petersen, funnust at lógini, men samstundis róstu nevndini, sum hevði gjørt nýggja uppskotið.



*Jógvan á Lakjuni helt ikki nógv um viðurskiftini í navnalógini*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Heðin Mortensen setti spurnartekin við løgfrøðiliga og moralska festi hjá lógini, tá ið segði, at lógin ikki kundi brúkast, tí hon gekk ímóti menniskjaligu rættindunum.

Høgni helt í flestu førum, at talan var um misskiljingar, og navnalógin er ein virðilig lóg, sum bert ásetur, hvussu vit skráseta okkum.

Samanumtikið var kjaki í tinginum lívligt, men var fyrst og fremst merkt av, at løgtingsmenn høvdu nógvar søgur at siga frá.



# Ferðaráðið umskipast

**Ein av komandi døgunum fer Bjarni Djurholm, landsstýrismaður við vinnumálum, at leggja uppskot fyri tingið um broytingar í lógini um Ferðaráð Føroya**

FERÐAVINNA
*Edvard Joensen*



*Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, fer at leggja fram uppskot um umskipan av Ferðaráðnum, sum formaðurin í Ferðaráðnum, Peter Oliver í Hoyvík, h.m., óttast fyri, kann hava fjaldar møguleikar fyri afturstigi við sær*

*Mynd: Edvard Joensen*

Stýrið fyri Ferðaráð Føroya skal víðkast frá trimum limum til umleið tað dupulta. Tað fer helst at gera arbeiðið hjá ráðnum tyngri, heldur formaðurin í Ferðaráðnum.

Í samband við uppskotið um framtíðar ferðavinnupolitikk, sum Bjarni Djurholm hevur lagt fyri Løgtingið, fer hann at leggja uppskot um umskipan av Ferðaráðnum.

Ferðaráðið, sum tað er í dag, hevur eitt trímannastýri, sum er valt sambært løgtingslóg. Í lógini stendur soleiðis:

»§ 3.1) Fyri Ferðaráðnum situr stýri við 3 limum, ið verða valdir soleiðis: 1 av Føroya landsstýri, ið er formaður, 2 av Føroya landsstýri eftir tilmæli frá ávikavist flutningsfeløgum, herundir ferðamanna- og kunningarstovum, og hotel- og gistingarhúsvinnuni, ið hvør sær skulu innstilla 3 evni.

Stk. 2. Stýrið er hægsti myndugleiki fyri ferðaráðnum og hevur ábyrgdina av virkseminum hjá ráðnum.

Formaður í stýrinum fyri Ferðaráð Føroya er Petur Oliver í Hoyvík. Hann sigur, at eftir hansara meting verður tað tyngri at arbeiða, tá stýrið fer at vaksa til tað dupulta ella so, um gingið verður eftir tí uppskoti, sum hann kennir til og væntandi fer at verða lagt fram.

Hann sigur, at vinnan framvegis fer at gera innstilingar til síni umboð, men at tað fara at verða fleiri stýrislimir, sum veljast skulu av eitt nú Vinnumálastrýrinum og Undirvísingar- og Mentamálastýrinum. Landsstýrismaðurin fer sjálvur at útnevna formannin í stýrinum.

Petur Oliver í Hoyvík sigur, at hann ivast eitt sindur í, hvussu rætt tað er, um Ferðaráðið í framtíðini fer at verða stýrt av einum embætismannastýri heldur enn av vinnuni sjálvari. Og tað heldur hann vera eina løgna gongd undir einum høgraliberalistiskum stýri, sum tað, vit hava í Føroyum í dag.

At stýrið verður manssterkari, heldur hann vera fyri at ganga ynskjum á møti, frá pørtum, sum meta seg sjálvan at eiga sess í stýrinum.

Formaðurin í Feðraráðnum vísir á, at stýrið fyrr hevur verið væl størri, enn tað er nú, men varð tøvt til tað núverandi, júst við teirri grundgeving, at tað helst fór at virka betri. Og hann metir, at tað hevur gingið rímiliga væl at fáa teir tríggjar stýrislimirnar at samstarva, sigur Petur Oliver í Hoyvík, formaður í stýrinum fyri Ferðaráð Føroya. At økja talið av stýrislimum, metir formaðurin kann fara at hava ein fjaldan møguleika fyri afturstigi við sær.

# Menna ferðavinnuna

**Landsstýrismaðurin við vinnumálum legði týsdagin uppskot um ferðavinnupolitikk fyri tingið. Talan er um álit, sum ein arbeiðsbólkur innan ferðavinnuna hevur evnað til**

FERÐAVINNA
*Edvard Joensen*

Ásannandi at føroyska ferðavinnan stendur á einum vegamóti, hevur landsstýrismaðurin við vinnumálum fingið gjørt eitt álit um ferðavinnu í framtíðini. Álitið varð lagt fyri tingið týsdagin.

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður við vinnumálum, sigur, at álitið um ferðavinnuna, hann nú leggur fram, er ein partur av tí samskipaða vinnupolitikkinum, sum fyrr er fráboðaður.

Ferðavinnan er ein serligur partur av inntøkugevandi vinnuni, sigur hann Ein partur, sum í ávísan mun brýtur av frá aðrari vanligari vinnu.

Bjarni Djurholm sigur, at ferðavinnan er sum so eingin sjálvstøðug vinna, uttan ein samanrenning av fleiri pørtum. Bæði professionellari vinnu og ítrivi hjá feløgum og einstaklingum.

### Ymsir partar

Nýggi ferðavinnupolitikkurin er býttur upp í fýra partar, sum í álitinum verða nevndir: Leikluturin hjá tí almenna, karmar, netverk og hagtalsgreiningar. Hvør av hesum pørtunum verður síðan viðgjørdur í uppskotinum, sum lagt varð fyri tingið týsdagin.

Uppskotið er eitt hefti, sum skrivað er niður til einar tólv síður burtur úr eini størri verkætlan, sum fyrr er gjørd, sigur Bjarni Djurholm.

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, sigur, at hugsjónin aftan fyri uppskotið um framtíðar ferðavinnuna, greitt miðar ímóti, at vinnan skal verða ein sjálvstøðu og berandi vinna, sum fer at seta dygd og tænastustøði í fremstu røð. Samstundis skal ferðavinnan sum sítt aðalmál leggja dent á at brúka og samstundis verja náttúru okkara, umhvørvi mentan eins og føroyska samfelagið sum heild, soleiðis at vit ikki offra nakað av okkara sereyðkennum fyri at tekkjast fremmandum ferðafólki. Tí tað er júst okkara sereyðkenni, fremmandamaðurin kemur at uppliva.

### Almenna uppgávan

Hóast ferðavinnan er ein sundurgreinað vinna, sum røkkur at kalla í hvønn privatan krók, hevur tað almenna eina heilt greiða og sera týðandi upgávu at røkja. Tað er at menna Føroyar sum ferðamannaland eins og at kunna um og marknaðarføra Føroyar sum ferðamál uttanlands, sigur arbeiðsbólkurin, sum hevur gjørt uppskotið um ferðavinnuna.

Tá tosað verður um tað almenna innan ferðavinnuna, verður hugsað um Ferðaráðið, sum er almenni ferðavinnustovnurin undir Vinnumálastýrinum.

Ferðaráðið skal millum annað hava til endamáls at fáa til vega eina góða og samskipaða tænastu, eins og syrgt eigur at vera fyri, at góðskan og trúvirðið hjá vinnuni altíð er í hæddini, sigur Bjarni Djurholm.

Ferðafólk, sum koma til Føroya, eiga at kunna kenna seg trygg við tað, tey keypa. Tí skulu góðir karmar skapast um vinnuna við reglum, sum tillagaðar eru altjóða marknaðarsamstarvi, sigur Bjarni Djurholm.

Ferðafólk, sum koma hendanveg, skulu altíð kunna hava álit á, at tað, vit selja teimum, ber til at líta á, og at tær avtalur, gjørdar verða, halda.

Og tað er ikki bara ein almenn uppgáva at syrgja fyri tí. Men so sanniliga eisini ein uppgáva hjá vinnuni sjálvari, sigur landsstýrismaðurin.

Uppskotið hjá Bjarna Djurholm, landstýrismanni við vinnumálum, um ferðavinnupolitikk í framtíðini kemur til aðalorðaskifti í Løgtinginum komandi týsdag.

# Eykaaðalfundur leygardagin

**Sjálvstýrisflokkurin fer at hava eykaaðalfund í Klaskvík leygardagin. Tá verður formansvalið endaliga avgreitt**

POLITIKKUR

Landsnevndin hjá Sjálvstýrisflokkinum samtykti á fundi týskvøldið, at eykaðalkfundur verður hildin í Klaksvík komandi leygardag.

Á tí fundinum verður Sámal Petur í Grund formliga valdur til formann, sigur landsnevndarformaðurin, Edvard Hermansen.

Edvard Hermansen fer sjálvur at leggja fram sína formansfrágreiðing til aðalfundin, sum ikki varð hildin seinasta leygardag, tá regluligi aðalfundurin ikki varð av nørkum vegna ov lítla undirtøku.

Hvat hann fer at siga í frágreiðingini, vil Edvard Hermansen ikki avdúka, uttan tað, at hann fer at leggja eina formansfrágreiðing fram, sum er merkt av hansra egnu støðu til floksmálið.

Um metingarnar, sum Jógvan Mørkøre, samfelagsfrøðingur hevur havt í pressuni um framtíðarstøðu Sjálvstýrisfloksins, sigur landsnevndarformaðurin, at hann metir tær í so svartskygdar.

At fólkatingsvalið fer at verða vánaligt, væntar hann, men hann metir, at tað fer at bera til at koma aftur í aftur áðrenn løgtingsvalið, sigur Edvard Hermansen.

**ej**